# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# LYFTI HALDA BARA TIL EITT VIST

Vit minnast tey góðu lyftini frá øllum teimum, sum buðu sær til at stýra landinum undan síðsta løgtingsvali. Boðskapurin var tann sami frá øllum: Gransking og útbúgving í hásæti. Altjóða universitet og nógvir granskingarstovnar.

Eingin veit á morgni at siga, hvar hann á kvøldi gistir, sigur orðatakið, sum sjálvsagt eisini kann brúkast um eitt valskeið – og sum ein góð undanførsla.

Bretar fara á val í morgin. Stóri spurningurin hjá teimum er, um annar av teimum stóru flokkunum megnar greiðan meiriluta, ella um Liberali flokkurin, sum plagar at vera við sviðusoð, fær politiska ávirkan. Um so er, so verður roknað við, at bretar fáa nýggja valskipan, sum líkist evropisku skipanunum við fleiri flokkum í stjórn. Í Danmark kenna vit blokkpolitikkin, har tveir blokkar – vinstrivongurin og høgrivongurin – skipa stjórn, alt eftir, hvør blokkur fær meiriluta. Í Danmark – og serliga í Bretlandi – kunnu veljararnir halda flokkarnir til svars fyri teirra lyfti.

Men tað ber slett ikki til í Føroyum, tí her er í so máta als einki skil í. Stjórnin, vit hava í dag, er tað nærmasta vit kunnu koma eini vittigheit. Høgra hond hevur ikki ánilsi av, hvat vinstra ger. Vit hava eitt landsstýri, sum als ikki fungerar. Landsstýrisfólk senda uppskot í tingið, men tey hava als onga hóming av – og enn minni ávirkan á – hvussu tey síggja út, tá tey koma aftur úr løgtinginum. Løgmaður segði tað so væl sjálvur, at hann kundi ikki vita, hvat løgtingið kundi finna uppá!

Fíggjarkarmarnir sum Jóannes Eidesgaard og løgmaður sendu í tingið eru eitt gott dømi. Hetta vísir, at tað als ikki eru fíggjarmálaráðharrin ella løgmaður og samgonguleiðarin, sum valda. Nei, landsstýrið stýrir ikki. Men tað ger fíggjarnevndin hjá løgtinginum. Tað sum er avgerandi er, hvat Anfinn Kallsberg og hansara fólk í fíggjarnevndini gera.

Tí kunnu fólk bara yppa øksl




víðari. Rektarin í Hoydølum má bara staðfesta, at hann má fylla skúlan við studentaskúlanæmingum, tí teir skulu við lóg sleppa í skúla, men tey eldru, sum ætla sær á HF, verða við sviðusoð.

Formaður Javnaðarfloksins á tingi skrivar á Facebook um *»syndarliga skilið«* og at *»Fólkaflokkurin og teir tríggir høgravendu sambandsmenninir á tingi blokera fyri, at ungdómurin fær útbúgving.«*

Men góðasti John Johannessen. Tað er ikki nóg mikið at skriva á Facebook – har flytir tú eingi fjøll. Nú er at vísa, at tað glógvar í onkrum – og at okkurt var um vallyftini kortini.

**» Landsstýrið er fyri tað mesta ein vittigheit**



## Rabarbuøl fær góð ummæli í Danmark

Rabarbuølin Ydun hjá Føroya Bjór, fær góð skotsmál frá donskum ølummælarum.

Ummælarar hjá Ekstra Blaðnum í Danmark geva føroysku Ydun ølini hjá Føroya Bjór góð skotsmál.

– Ølin hevur ein vakran kláran og krystalreyðan lit, og tann eitt sindur súrligi og uppfrískandi rabarbusmakkurin er eitt sikkurt hitt, skrivar ummælari hjá Ekstra Blaðnum.

## Regin Hammer varastjóri í Tryggingarfelagnum

TF Holding P/F boðar frá, at felagið styrkir um fyrisitingina við at seta Regin Hammer sum varastjóra. Stjóri felagsins er Gunnar í Liða.

Regin Hammer er 36 ára gamal og hevur Master útbúgving í búskapi frá University of Dundee. Hann hevur verið stjóri í egnari ráðgevingarfyritøku síðani 2006 og eisini verið umboðsmaður fyri DONG Energy A/S seinastu árini.

Nýggi varastjórin er eisini nevndarlimur í TF Holding P/F, sum m. a. er móðurfelag hjá Betri Pensjón og Tryggingarfelagnum Føroyar, har Regin Hammer eisini er nevndarlimur.

TF Holding eigur eisini í partafeløgum so sum Dagsbrún, Hotel Føroyar, Effo, Formula International, Grnlandsbanken TF Ognir og TF Íløgur.

*eirikur@sosialurin.fo*





**» Tjóðveldi er til reiðar**

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 19



**» Jørgen er stuttligur**

HANS PAULI STRØM
KJAK Á SÍÐU 14



## Stórt fall í flogferðsluni

30% færri ferðafólk ferðaðust um flogvøllin í apríl mánaði. Eldgosið í Eyafjallajøkuli í Íslandi, sum hevur sett síni spor í flogferðsluni um alt Evropa, sæst nú týðuliga aftur í ferðafólkatølunum hjá Vága Floghavn. Higartil í ár eru 49.342 ferðafólk komin og farin um flogvøllin.

Í apríl mánaði hava tilsamans 11.866 fólk ferðast um flogvøllin. Hetta eru 30,9% færri enn í sama mánað í fjør, tá ferðafólkatalið var 17.036. Afturgongdin hevur verið á Danmarkarleiðunum og Bretlandsleiðunum við ávikavíst 33,8% og 38,9%, meðan ein minni framgongd hevur verið á Noregs- og Íslandsleiðunum.

Í fjør vóru páskirnar í apríl, so øll páskaferðslan tá eisini var í apríl. Í ár vóru páskirnar um mánaðarskiftið mars/apríl, so nakað av páskaferðsluni var í ár í mars, meðan nakað var í apríl.

Fyrstu fýra mánaðirnar í ár vóru tilsamans 49.332 ferðafólk um floghavnina. Hetta er 8,4% færri enn sama tíðarskeið í fjør, tá talið var 53.846. Higartil í ár hevur eisini verið afturgongd á Danmarkar- og Bretlandsleiðunum, meðan framgongd hevur verið á hinum leiðunum.

Higartil í ár eru 1.310 flogfør komin og farin um floghavnina. Tað er 3,1% fleiri enn sama tíðarskeið í fjør, tá 1.270 flogfør komu og fóru um floghavnina.

*eirikur@sosialurin.fo*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*